

*Umhvørvið verður nakað broytt og tænastustøðið verður lyft upp á altjóða stig*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skal lyftast upp á altjóða støði

**Fyrsta januar yvirtók Havgrímur Johannesen raksturin av kafeteria á flogvøllinum, og fyrst í mars letur nýtt og framkomið kafeteria upp á altjóða støði**

Leo Poulsen

Tað er Vága Floghavn, sum eigur allar fasilitetir vesturi á flogvøllinum, og hesir verða so lisiteraðir út til feløg og fyritøkur at reka.

Ein av hesum fasilitetum er kafeteria, og frá fyrsta januar at rokna, er tað Dvøljan hjá Havgrími Johannesen, ið rekur matstaðið.

– Vit hava ætlanir um at broyta alt umhvørvið og lyfta tað upp á eitt hægri støði. Vit hava jú royndir við Sunset, Burger King og Baresso, og vit fara at taka tað besta frá hesum trimum og flyta tað vestur á flogvøllin, sigur Havgrímur Johannesen.

Vága Floghavn vildi hava tænastustøðið sett upp, og tá Havgrímur Johannesen hevur drúgvar royndir á økjunum innan omanfyri nevndu, umframt at hann eisini eigur dansistaðið Deep, sum gevur royndir innan útskeinking, kom hann inn í myndina.

– Vit fara so nú undir eina umbygging, sum fer at gera tænastustøðið nógv hægri, og gongur alt sum ætlað, letur staðið upp av nýggjum fyrst í mars mánað, sigur Havgrímur Johannesen.

Ein av eyðsýndu broytingunum verður, at partur av diskøkinum verður ein barr við barrstólum.

– Kafeteria hevur fult skeinkiloyvi, men tað hevur ikki verið týðiligt hjá teimum, sum ferðast um flogvøllin. Hetta fer at verða skipað við einari veruligari barr, har ymsu sløgini verða sjónlig og kundin kann síggja, hvat er at velja ímillum, sigur Havgrímur Johannesen.

Útboðið verður eisini nógv baserað upp á kaffi.

– Vit fara at hava nýmalið kaffi, og vit fara at hava øll tey ymisku kaffisløgini sum espresso, cafe latte, capucino, stutt sagt øll sløg, sum vit hava í Baresso í Havn, sigur Havgrímur Johannesen.

## Lammhults Lounge

Reint fysiskt verður økið ikki so ógvuliga nógv broytt, men kosmetiskt verður stór broyting.

– Sum eg nevndi verður ein partur av matarøkinum gjørt til barr, men eitt annað, sum fer at lyfta støðið ógvuliga nógv, er ein nýggj lounge. Hetta verður ein lounge sum verður lyft upp frá gólvinum, og har verða flottir designaramøblar hjá fólki at hvíla í, sigur Havgrímur Johannesen.

Hann hevur sett seg í samband við kendu svensku møbil designarafyritøkuna Lammhults, sum skal møblera lounge'ina.

– Vit vilja fegin lyfta støðið upp á eitt altjóða støði, og tí gera vit rættiliga stórar íløgur í hesa lounge'ina. Og sjálvt um vit vita, at hendan umbyggingin verðu rivin niður aftur um trý ár, tá útbyggingin av flogvøllinum skal verða liðug, so er her talan um møblar, sum vit kunnu flyta yvir í nýggju hølini, sigur Havgrímur Johannesen.

Hann hevur gjørt avtalu við svensku fyritøkuna sum ber í sær, at nýggja lounge'in fær heitið Lammhults Lounge.

Eisini verður spæliplássið dagført frá at vera ein rusjibani til at verða eitt veruligt spælipláss.

## Opið tá flogið verður

Umbyggingin av umhvørvinum avmarkar seg eitt sindur sjálv, tí um trý ár stendur nýggi terminalurin liðugur, og tí verður hildið eitt sindur aftur.

– Men sum nevnt, so kunnu møblar og ymsu maskinurnar jú flytast í nýggja terminalin, so har verður ikki spart, sigur Havgrímur Johannesen.

Hann ætlar í fyrsta umfari at hava sama tal av starvsfólkum.

– Vit hava gjørt avtalu við leiðaran og starvsfólkini, sum eru, um at flyta við, men vónandi fer hækkaða tænastustøðið at føra til størri virksemi, sigur Havgrímur Johannesen.

Tað ferðast eini 230.000 ferðafólk um flogvøllin tilsamans, íroknað leiguflogfør og tyrluflúgving til og frá boripallum.

– Eitt, sum vit fara at leggja okkum rættiliga eftir, er at hava opið, tá flogferðsla er, og sum eitt minimum fara vit at hava opið til regluligu ruturnar, sigur Havgrímur Johannesen.

Eingin flogvøllur uttan eina kiosk, og hon verður sjálvandi eisini í nýggja konseptinum.

– Vit fara at hava alt tað, sum hoyrir til í einum kafeteria á einum flogvølli, og vónandi stendu alt liðugt fyrst í mars, sigur Havgrímur Johannesen, stjóri í Dvøljuni.